granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL



# Leiðin frá hugskoti til pengar

## um tú kundi hugsað tær at fingið stuðul til gransking, menning og nýskapan?

Felags kunningarfundur um stuðulsmøguleikar til gransking, menning og nýskapan verður í Norðurlandahúsinum 21. mai 2010 frá kl. 13 til 16. Øll tey, sum umsita játtanir innan hetta økið, koma at greiða frá, hvat kann stuðlast, hvør kann fáa stuðul og hvussu hetta gongur fyri seg. Harafturat verður ein fyrilestur til íblásturs.

Tiltakið er ætlað teimum, sum umhugsa at søkja stuðul til gransking, menning og nýskapan, stovns- og virkisleiðarum, politikarum, fjølmiðlum, men øll við áhuga fyri evninum eru sjálvsagt vælkomin. Tiltakið er alment og ókeypis.

**Skráin:**

**kl.13.00-13.05** Vælkomin – Annika Sølvará

**kl.13.05-14.15** 7 stuttar framløgur um stuðulsmøguleikar og krøv:
Granskingarráðið – Annika Sølvará
Fiskivinnuroyndir – Jákup Mørkøre
Vinnuframagrunnurin – Regin W. Dalsgaard
Innlendismálaráðið, Umhvørvi & Orka – Anni á Hædd
NORA – Lars Thostrup
Northern Periphery Programme – Niclas Forsling
FP7 – John D. Olsen

**kl.14.15-15.00** Kaffiprát – básar við individuellari kunning, tilfari o.s.fr..
Afturvið verður kaffi, te, køka og frukt.

**kl.15.00-16.00** *Balance og samspil mellem konkurrenceudsatte midler og basismidler*
Fyrilestur við Inge-Sofie Sørensen, stjóra fyri Forskning og Innovation á Naturvidenskabelig Fakultet við Københavns Universitet
Spurningar og kjak

FISKIVINNU GRANSKING · NORA Nordisk Atlantsamarbejde www.nora.fo

Bryggjubakki 12 | Postrúm 259 | FO-110 Tórshavn | Tel + 298 567800 | gransking@gransking.fo | www.gransking.fo

Sosialurin / KvR 34 18 00



# ROKNSKAPARFÓLK TIL ATLANTIC PETROLEUM

## Vilt tú gerast partur av eini børsskrásettari fyritøku, sum virkar á altjóða pallinum?

Vit søkja eftir dugnaligum starvsfólki at hava um hendi bókhald okkara. Starvið fevnir fyrst og fremst um bókhalds- og roknskapararbeiði har atlit skulu takast til serlig viðurskifti og krøv galdandi fyri eina børsskrásetta fyritøku. Umframt bókhaldsstarvið kemur tú í mun til tínar førleikar at luttaka í øðrum uppgávum.

Dentur verður lagdur á at skapa eitt jaligt arbeiðsumhvørvi har starvsfólkini arbeiða sjálvstøðugt og í toymum

**Útbúgving og førleikar**
> tú hevur útbúgving innan bókhald og búskap
> tú hevur hollar royndir innan KT og serstakliga við Navision bókhaldsskipanini
> tú samskiftir væl á enskum

**Persónligir eginleikar**
> tú hevur eitt skipað arbeiðslag
> tú dugir at raðfesta og at halda ásettar freistir
> tú hevur ein jaligan hugburð og ert liðspælari

Til rætta fólkið bjóða vit eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv í eini fyritøku, sum er í støðugum vøkstri við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir verða ásettar í mun til tínar royndir og førleikar.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum verða at senda við vanligum brævi til:

Atlantic Petroleum
Postboks 1228
FO 110 Tórshavn

ella við teldubrævi til: sigurdj@petroleum.fo.
Gev gætur, at vanlig brøv skulu hava frámerkið "Roknskaparfólk".

Umsóknarfreistin er 23. mai 2010.

**Meira at vita?**
Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú seta teg í samband við Sigurð í Jákupsstovu á tel. 210280 ella á sigurdj@petroleum.fo.

**Um Atlantic Petroleum:**
P/F Atlantic Petroleum er eitt óheft føroyskt oljufelag, sum virkar í altjóða umhvørvi í samstarvi við øðrum oljufeløgum. Felagið hevur ognarpartar í olju- og gassloyvum í Norðsjónum, í keltiska havinum og á føroyska landgrunninum. Samtakið fevnir um móðurfelagið P/F Atlantic Petroleum, Atlantic Petroleum UK Ltd. og Atlantic Petroleum (Ireland) Ltd. Felagið miðar eftir frálandamøguleikum í búnum leitingarøkjum í útnyrðingspartinum av Evropa og sum frá líður eisini á føroyska landgrunninum. Vit stila eftir eini góðari javnvág millum leiting, útbygging og framleiðslu. Atlantic Petroleum er skrásett á virðisbrævamarknaðunum NASDAQ OMX í Íslandi og í Keypmannahavn. Høvuðssæti felagsins er í Tórshavn, og umframt hevur felagið skrivstovu í London. Í løtuni starvast 7 fólk í felagnum.

P/F Atlantic Petroleum, Gongin 9, Postboks 1228, 110 Tórshavn, Telefon: 350100, Faks: 350101, www.petroleum.fo

ATLANTIC PETROLEUM

www.sansir.fo